# Ávísi 114 Orku- og veðurlagspolitikkur
## - og ætlanir at minka munandi útlátið av vakstrarhúsgassi

**(indicator 114 low-carbon development strategies and plans)**

**--- Grein 4 stk 19 í Paríssáttmálanum**

Sigurð í Jákupsstovu, Umhvørvisstovan

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

# Skyldan at orða ein langtíðar orku- og veðurlagspolitikk

Sambært grein 4 stk 19, í Paríssáttmálanum, “skulu allir partar til sáttmálan stremba eftir at orða og boða frá langtíðar menningarætlanum at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, havandi í huga grein 2 har hædd verður tikið fyri teirra felags tó ymisku ábyrgd og hvør í sínum føri ymisku evnum, sæð í ljósinum av ymsum nationalum umstøðum”

LT-LEDS: Long Term - Low Emission Development Strategy

In accordance with Article 4, paragraph 19, of the Paris Agreement, “*all Parties should strive to formulate and communicate long-term low greenhouse gas emission development strategies, mindful of Article 2 taking into account their common but differentiated responsibilities and respective capabilities, in the light of different national circumstances*”

# Hava vit eina ætlan ?

- **LM-130/2021**: Uppskot til samtyktar um mál Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi komandi 10 árini og uppskot til dagførdan orku- og veðurlagspolitikk
- Samtykt 05.05.2022

- *Okkara mál at minka útlátið av vakstrarhúsgassi við í minsta lagi 30 prosentum merkir, at í 2032 skal útlátið av vakstrarhúsgassi vera lægri enn 525.000 tons CO2-eindir í mun til umleið 750.000 tons CO2-eindir í 2010.*

- *Øll 25 átøkini verða býtt út á næstu trý árini, tó við undantaki av átaki 9 (umhvørvisgjøld á oljurikin akfør) og átaki 24 (CO2-avgjald á olju). Grannalondini og nógv onnur lond hava fyri tíð síðani lagt slík gjøld á,og verða slík gjøld mett av serfrøðingum sum eitt gott og neyðugt amboð fyri at fáa fólk at leggja um frá olju til grønar loysnir. Nú oljuprísurin er søguliga høgur, verður ikki mett rætt at koma við øktum oljuavgjøldum nú. Heldur eigur hetta at verða tikið upp um eini tvey ár, har mett verður um, hvørt tíðin tá er búgvin at áseta oljuavgjøld.*

# 25 átøk

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Útbygging av vindorku | | 240 MW |
| 2 | Pumpuskipan | | Vestmanna, Suðuroy |
| 3 | Smá vatnorkuverk | | Til eginnýtslu |
| 4 | Vetnisframleiðsla – PtX | | Greina møguleikar fyri PtX |
| 5 | Smá sólorkuverk | | Á tekjur |
| 6 | Miðalstór sólorkuverk | | Á tekjur |
| 7 | Útboð av stórum sólorkuverkum | | Í lendinum |
| 8 | MVG afturbering elbilar | | |
| 9 | Umhvørvisgjøld og bann fyri oljurikin akfør | | |
| 10 | Almenn ferðsla skal vera grøn | | Bussar, ferjur |
| 11 | Banna oljufýringar í nýggjum bygningum | | |
| 12 | Stuðul til niðurtøka av oljufýringum | | |
| 13 | MVG afturbering hitapumpur | | |

# 25 átøk

| | | | |
|---|---|---|---|
| 14 | Lóggáva um fjarhita | | Sett í elveitingarlógina |
| 15 | Óheft orkuvegleiðing | | Sett í verk |
| 16 | Orkumerking og stuðul til bjálving | | |
| 17 | Bíligari elorku til íðnaðin | | Skipan við avlopsorku |
| 18 | Reglur um F-gass | | F-gasskunngerð 2023 |
| 19 | Avgjald á F-gass | | Ll um toll og avgøld |
| 20 | Burðardygg býarmenning | | Við atlit til at minka útlát |
| 21 | Orkuvirkni hjá skipum | | Krøv setast um orkuvirkni |
| 22 | Stuðul til (grøna) skipabygging | | Treytast grønum loysnum |
| 23 | Landstreym til skip | | 2 mió í 2025 |
| 24 | CO2 gjald á alla oljunýtslu | | |
| 25 | Verja og endurbøta vátlendi og haga | | Skráseting, náttúruvernd |
| | | | |

# 25 átøk – tað almenna og vinnan lyfta í felag



# ”Semjuskjalið” Sera týðandi politisk semja millum landsmyndugleikar og kommunur sum eigarar av SEV – frá 22 mars 2022

Semjuskjal.pdf

- Útbygging av varandi orku
- Skipan av SEV
- Fleksibla prísskipan
- Brúkarar, vinna, SEV og myndugleikar
- Skipan fyri avlopsorku

- Arbeitt verður við at implementera tey 10 punktini sum semjuskjalið fevnir um
- Neyðugt at allir partar samstarva


UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

SEV

Kommu

SEMJUSKJAL

*Havandi í huga* skyldu Føroya til at avmarka útlátið av vakstrarhúsgassum;

*Havandi í huga* felags málið hjá almennu Føroyum og SEV um, at øll orkunýtsla á landi skal vera úr varandi orkukeldum;

*Ásannandi* at hetta krevur, at elframleiðslan úr varandi orkukeldum skal fleirfaldast komand

*Ásannandi* at orkumyndugleikin, sum leggur til rættis orkupolitikkin og skipar útboð elveitingarlógini, og kervisábyrgdarin, sum varðar av elnetinum, hevur veitingarskyldu og elgóðskuna til brúkaran, eiga at samstarva tætt;

*Ásannandi* at samstarvandi partarnir í felag eiga at virka fyri, at føroyska elkervið støðugt ment, styrkt og rikið á ein fyri brúkaran ódýran hátt;

*Ásannandi* at hóast tilboð verða ment í sambandi við avlopsorku ella til at stimbra undir elnýt varandi orkukeldum, so verður hildið fast við samhaldsfasta skipan, soleiðis at prísskráin fyr eins uttan mun til hvar í landinum fólk búgva;

*Havandi í huga* at í eini skipan við elframleiðslu frá lutvíst óstøðugari orku eiga fleiri partar í skip

# Elframleiðslan – hvussu gongur samanborið við ætlan? 1000 GWT [kelda SEV]



# Broyting í oljusølu á landi 2020 – 2024 [kelda Hagstova Føroya]

| | Akfør | Ídnaður | Handil og tænastufyritøkur | Húsarhald og felagsskapir | Almennir stovnar | SEV | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2020 | 35.249 | 26.765 | 4.122 | 37.588 | 7.858 | 51.687 | 163.269 |
| 2021 | 36.100 | 21.197 | 4.116 | 37.691 | 7.573 | 54.116 | 160.793 |
| 2022 | 34.843 | 25.755 | 3.732 | 34.360 | 7.246 | 43.588 | 149.524 |
| 2023 | 33.588 | **34.044** | 3.631 | 31.472 | 6.689 | 47.627 | 157.051 |
| 2024 | 32.555 | 29.079 | 3.537 | 28.572 | 6.934 | 43.682 | 144.359 |
| | | | | | | | |
| | **-8%** | **9%** | **-14%** | **-24%** | **-12%** | **-15%** | **-12%** |

2020-2024

- 17% vøkstur í oljusølu til skip
- 2% vøkstur í oljusølu samanlagt
- **12% minking í oljusølu á landi**



# Ja vit hava eina ætlan ... men

- Í høvuðsheitum fyri virksemi á landi
- Tað gongur ov seint ...
  - at leggja um frá olju til el
  - at byggja út varandi orkuverk - vindur og sól
  - at fremja orkupolitikkin
  - at fremja semjuskjalið
  - at gera langtíðar menningarætlanir fyri hvussu samfelagið skal skipast uttan útlát
- Hvør er orsøkin?
  - Politisk ósemjur?
  - Vantandi lógarkarmar og møguleikar fyri hvussu vinna og privat kunnu luttaka í orkuskiftinum

# Spurningar at svara:

- Hvussu sær framtíðar orkuskipanin út?
- Hvussu skal framtíðar orkuskipanin fíggjast?
- Dynamiskar prísskipanir?
- Hvussu kunnu vit skapa grundarlag fyri aktivum el-brúkarum sum stuðla undir skiftandi útboði av elorku
    - Smart Grid – Virtual Power Plants
- Hvussu skulu vit goyma orku?
    - Smá og desentral battaríir –> stór sentral battarír
    - Pumpuskipanir?
    - Vetni?
    - Há-hitagoymslur?
- Hvørja veitingartrygd ynskja vit?
    - Uppgávan hjá SEV
    - Leiklutir hjá vinnulívinum

# Politiska skipanin eigur at:

- Áhaldandi virka fyri at fremja orkupolitikkin
- Leypandi endurskoða átøkini og málini

- Seta greiða tíðarætlan og ítøkilig mál fyri orkuskiftið
- Og skapa neyðugar karmar fyri at orkuskiftið kann eydnast

*Having a plan - may not be a recipe for success,*

*- not having one is a recipe for failure*

- *Laurence Tubiana (CEO of European Climate Foundation/Founder 2050 Pathways Platform, France's Climate Change Ambassador and Special Representative for the 2015 COP21)*

# Takk fyri !